## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á 90 ára degnum tann 6. apríl.

Eina serstaka tøkk sendi eg 1. deild hjá NSÍ, sum við sangi møtti upp fyri at gleða meg.

Eisini vil eg takka Verner og hansara fólkum, sum løgdu karm um veitsluna og gjørdu dagin á Svangaskarði sera hugnaligan og minniríkan.

*Niclas*

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at elskaði maður, góði pápi, verpápi og abbi okkara

**Jógvan Olsen**
Toftir

andaðist umborð á Western Pacific 11. august, 52 ára gamal.
Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Familjunnar vegna*
**Edith, June, Aron og Eir**

---

## Tøkk

Tykkum, sum á einhvønn hátt hjálptu til, tá kæra móðir

**Malla Reynbú**
Funningur

Fødd 1. august 1901, doyði 21. juli og varð jarðað 25. juli 2002, takki eg av hjarta.

Serliga tit á Korndalsbýli, takk fyri umsorgan tykkara, ta tíðina hon var hjá tykkum.

Fyri peningagávur til Funnings kirkju, fyri blómur og tit, sum fylgdu henni til seinasta hvíldarstaðin, tøkk øll somul.

*Vegna tey avvarðandi*
**John**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæra systir okkara

**Gerda Magnussen**
Trongisvágur

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til prest fyri góð orð í kirkjuni, sangarar og berarar og ein serlig tøkk til tykkum, sum vóru um hana seinastu tíðina.

Tøkk fyri blómur og kransar og tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jona**

---

# Minningarorð um Gerdu Magnussen



Fríggjadagin 2. aug. 2002 andaðist Gerda Magnussen úr Trongisvági. Móð og troytt av longum stríði, móð og troytt av sjúku, men eisini mett av døgum. Og løgið var tað, at tað júst hendi henda dagin, tí dagurin var hennara føðingardagur. 88 ár náddi hon at gerast.

Gerda varð fødd 2. aug. 1914 í Trongisvági. Foreldrini vóru Danjal Jacob Magnussen, eisini nevndur Bóndin, og Johanna fødd Vestergaard, ættað av Økrum. Gerda var fjórðelst av átta systkjum, fimm brøðir og tríggjar systrar.

Langa lívsstarv hennara var at tæna øðrum. Hon var ein tænarins ond í orðsins sanna týdningi. Tá hon ikki fekk sína egnu familju, valdi hon í staðin at ríka onnur við sínari umsorgan. Í meira enn 40 ár helt hon hús úti á Torvheyggi hjá Elgerdu Jacobsen og Elspu Vestergaard, sum var mostur hennara. Í einbýli, langt frá øðrum húsum, búleikaðist tær í mong ár. Og neyvan hevur tað altíð verið líka lætt at fingið alt til høldar. Harumframt tók hon dagliga longu leiðina inn til Trongisvágs, har hon var um foreldur síni. Men við sínum stillføra arbeiðshátti bar alt til.

Mangur man hava sitið væl til borðs bæði úti á Torvheyggi ella inni í Fornarætt í sínari tíð og kent hennara gestablídni.

Hóast Gerda ongantíð fekk mann ella børn, so var tað neyvan nakar í familjuni, sum var meira familjukærur og familjutrúgvur enn júst hon. Hon fylgdi við øllum. Tað fór eingin føðingardagur framvið. Og hetta var eisini galdandi fyri ungu alvaranar, sum komu.

Seinastu fimtan árini vóru hon og mamma saman. Tær búðu fyrst nøkur ár saman í Fornarætt inni í Trongisvági, sum var teirra barnaheim, áðrenn tær fluttu út á Tippi á Tvøroyri. Á henda hátt stuðlaðu tær hvørjum aðrari, tá mammu gjørdist einsamøll, og árini tyngdu. Eisini fyri hetta eru vit sera takksom.

Hennara eyðkennu vóru umsorgan, trúfesti og stillføri. Eginleikar sum mong ynskja sær. Í einari tíð, sum annars er sera nógv merkt av sjálvsøkni og tað at koma sær sjálvum fram, er tað hugtakandi, at hava kent eina menniskju, sum altíð lat onnur koma fram og stuðlaði teimum. Lítillátin, sum hon var, stuðlaði hon altíð øðrum. Og sum prestur so væl segði, so eru hesir eginleikar teir bestu, sum ein menniskja kann eiga. Altíð at hava tíð til onnur, altíð at hava umsorgan fyri øðrum. Sjálvt seinastu dagarnar, so vóru tað ikki hennara trupulleikar, sum lógu henni á sinni, men umsorganin fyri, hvussu øll hini nú høvdu tað. Og enntá harmaðist hon um, at hon lá øðrum til byrðu. Vit, sum vóru hennara nærmastu, kendu ágóðan av hennara ótrúliga vilja til at hjálpa.

Tað var tí náttúrligt, at júst ein sálmur við tøkkini sum høvuðsboðskapi varð sungin við jarðarferðina.

*Takk, Guð fyri alt, sum hendi,*
*fyri gávur, tú oss ber,*
*fyri tíð, sum er at enda,*
*fyri stundina, sum er!*
*Takk, Guð, fyri ljósa várið*
*fyri myrka, kalda heyst,*
*fyri hvørt hitt gloymda tárið,*
*fyri hjartafrið og treyst.*

Góða mostur, nú hevur tú fingið frið. Vit drýpa høvur í takksemi til tín fyri tað nógva, sum tú var fyri okkum og lýsa Guðs signing yvir minnið um Gerdu Magnussen.

***Jóannes***


FÓLK TIL MÓTTØKUNA Á SMYRIL LINE

Søkt verður eftir tilkomnum fólki til móttøkuna á Smyril Line.

Viðkomandi skal verða røkin, hava teldukunnleika, verða fryntlig/-ur og umfrámt norðurlendsku málini duga enskt og helst eisini nakað av týskum.

Møguleiki er fyri, at starvið verður sett sum 2 hálvtíðarstørv.

Løn samb. avtalu.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

Umsóknin, merkt "Móttøkufólk", skal verða okkum í hendi innan

SMYRIL LINE
Postsmoga 370 • 110 Tórshavn

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn, deildir í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Síðan 1983 hevur MF Norröna, ið hevur pláss til 1.050 ferðafólk og 300 bilar, silgt millum Norðanlond. Vegna vaksandi talið av ferðafólkum byggir Smyril Line nýtt skip, sum verður sett í sigling á várið 2003. Nýggja Norröna verður 30.000 BRT og hevur pláss til 1.500 ferðafólk og 800 bilar.
Smyril Line eigur harafturat Hotel Føroyar, Vallaraheimið Tórshavn ogmeirilutan í sluppini "Norðlýsið".

team85



Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg




# Gamlar motorsúkklur vístar fram

**Farna vikuskiftið var Mentanar- og Róðrarstevna á Tvøroyri og í samband við stevnuna tóku nøkur fólk seg saman at sýna fram nakrar av teim ellismotorsúkklum, ið finnast á staðnum. Millum annað eru heilar fýra av merkinum Triumph á sama stað og tað er merkisvert**

ELLISAKFØR
*Dagfinn Olsen*

Tað var filmssjónleikarin Marlon Brando, sum í fimmtiárunum leitki filmin The Wild One, sum gjørdi Triumph motorsúkklurnar kendar og eftirspurdar.

Ensku Triumph eru í dag ikki so vanligar og eru tí ikki lættar at fáa hendur á og hava eisini stórt virði.

Tí tóku fólk seg saman í góðveðrinum á Mentanar- og Ráðrarstevnuni á Tvøroyri farna vikuskiftið, og savnaðu nakrar gamlar motorsúkklur, ið eru á staðnum.

Teirra millum eru nevniliga heilar 4 av merkinum Triumph og er hetta merkisvert at finna á sama stað.

Tróndur Enni, ein av stigtakarunum, sigur, at tað er vert at leggja til merkis, at so nógvar eru á einum stað. Hann metir, uttan at vita við vissu, at í Føroyum eru neyvan meira enn eini 6- 8 ella kanka 10 motorsúkklur av Triumph slagnum.

Fýra glaðir ánarar eru á Tvøroyri. Ein av ánarunum var á motorsúkklustevnu í Danmark og hóast eini 400 súkklur komu saman, so var hann tann einasti, ið koyrdi á Triumph.

Tróndur Enni, ið lesur tónleik í Íslandi, var heppin og fekk hendur á síni Triumph fyri ein ikki alt ov dýran penga. Súkklan hjá Trónda, ið stendur fremst í myndini, er eitt sonevnt USA snið og er tí ógvuliga serstøk. Hon er gjørd til amerikanska marknaðin og er frá 1972.



*Fyri viku síðani vóru hesar flottu ellismotorsúkklurnar at síggja á Tvøroyri, har tær eisini hoyra heima. Merkisvert er, at fýra Triumph motorsúkklur eru á sama stað, tí tær eru annars heldur sjáldsamar. Tað var Marlon Brando, sum gjørdi Triumph kendar í fimmtiárunum*

*Mynd: D.Olsen*

Hinar Triumph motorsúkklurnar hava allar verið á Tvøroyri mestsum alla ævi sína. Tvær eru frá 1964 og ein er eldri.

Umframt Triumph motorsúkklurnar, vóru eisini ymsar aðrar vístar fram uttanfyri handilin hjá D.J. Enni á Tvøroyri farna vikuskiftið. Ein 28 ára gamal Vespa scootari, ein 28 ára gomul Yamaha motorsúkkla og ein sanniliga eisini BSA, ið er frá síðst í fýratiárunum ella fyrst í fimmtiárunum.

Tróndur heldur, at óivað standa fleiri ellismotorsúkklur í kjallarum ymsastaðir, men at finna fýra væl koyrandi og flottar Triumph motorsúkklur á einum stað, og so í útjaðaranum í Føroyum, er av sonnum merkisvert, og tí tóku menn seg saman at sýna fram í samband við stevnuna farna vikuskiftið.


REINGERÐARLEIÐARI

til Kollafjord Pelagic P/F

Vit sóknast eftir reingerðarleiðara at standa fyri vasking av framleiðsluhølum og tólum í sambandi við dagligu framleiðsluna.
Talan er um kvøld- og náttararbeiði, sum reingerðarleiðarin skal luttaka í.

Góð løn verður latin.

Viðkomandi skal kunna byrja skjótast tilber.

Áhugað kunnu venda sær til:

Kollafjord Pelagic P/F
Inni í Firði
FO-410 Kollafjørður
Tel 47 88 88

Kollafjord Pelagic



i
Sosialurin

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo



Mini Cruise
tann seinasta mini-Cruise ferðin við gomlu Norrönu
2-4 sep.
Á ferðini spæla
"Vestmenn"
Risa Bingo við Bibi á odda
At vinna verða ferðir við nýggju Norrönu, pakkaferð til Danland, vikuskiftisuppihald á Hotel Føroyum og mangt annað
úr 750,-
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00